# E - og tónleikurin



**Finnur Jensen, tónleikari og tíðindarødd á Rás 2**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Vit høvdu eitt lítið elektriskt orgul, sum eingin dugdi at spæla uppá. Tað hevur savnað dust til nú, áhugin er vaksin eitt sindur.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Byrjaði at spæla trompet, tá eg var 9 ára gamal. Skifti seinni til eina alt-saxofon, sum eg spældi uppá í nógv ár. Nú er tað kassa-gittarin.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Tað plagi eg ikki at gera. Tað kann koma fyri, kanska ein leygardag, áðrenn man fer í bðin.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Droymdi øll barnaárini um at gerast besti saxofon-spælari í Føroyum. Tað er nú dottið niðurfyri. Eg havi annars ongantíð droymt um at gerast tónleikari. Tað hevur altíð verið eitt ítriv, sum hevur fylt ein part av frítíðini.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Tónleikur hevur nógv at siga. Fyri meg verður tónleikur settur í bás beint aftaná svøvn og mat. Eg vil helst ikki vera honum fyri uttan. Hann hevur eina ótrúliga ávirkan á sinnið.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Ikki so nógvar. Beiggi mín hevur altíð keypt fløgurnar, og nú, hann er fluttur heimanífrá, hevur hann tikið allar fløgurnar við sær og nakrar av mínum við. Annars eigi eg eini 80-100 fløgur.

*Hvør er tín yndisfløga?*
– Í løtuni lurti eg nógv eftir nýggju fløguni hjá Radiohead, Tim Christensen og svenska popp-orkestrinum Motorhomes. Annars verða báðar fløgurnar hjá Coldplay spældar minst einaferð um dagin.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Tað má vera mínar tvær fyrstu fløgur, sum eg fekk frá mammu míni. Onnur var av Kriss Kross og hin av Poison.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Veit ikki rættiliga. Skúlin er liðugur, Flippan og allir hasir føroysku barnasangirnir nytta sum heild ikki nógv.

*Hvør er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Tað má vera Poison - ella onkur rotin føroysk stakfløga, sum eg havi fingið.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Something hjá Beatles. Hann er besti kærleiksangur nakrantíð og riggar væl til karaoke.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Beatles er altíð gott. David Gray er eisini góður, kanska Oasis, men annars kann techno-tónleikur seta huglagið, áðrenn man fer í bðin, hóast techno ikki sigur mær tað stóra.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Sunnumorgun, hvat er tað?

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Tað kann ikki vera nógvur tónleikur, sum beinleiðis fær meg í ringt lag, men dansitónleikur og sálmar, sum snúgva seg um deyða og pínslu, hjálpa ikki beinleiðis upp á lagið. Og so hasir barnasangirnar, sum man vaknar av hvønn morgun, puha!

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Tað eru ikki nógvir, sum kunnu tað, men kanska eitt lag hjá Justin Timberlake ella okkurt disko-lag.

*Hvør er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Final Countdown hjá Europe dámdi mær væl, og We are the World, sum amerikanskir tónleikarar sungu fyri afrikanum. Minnist ikki, hvør av teimum kom áðrenn.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Tað má mamma gera av.

*Hvør er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Má viðganga, at eg ikki havi verið til so nógvar. Tað má vera okkurt hjá Frændum, tá teir vóru í hæddini.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Annar av Gallacher-brøðrunum úr Oasis. Teir vóru stór idol tann tíð, tað var. Annars Paul McCartney, tað hevði ikki verið so galið.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Durita Holm, durita75@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Bog Forum og skúlagarðurin í Monachil

„BOG FORUM er en skandale. Bog Forum er en forbrugerbegivenhed..." Soleiðis byrjar danska tíðindablaðið Information sína serútgávu um bøkur. Bog Forum er tann stóra bókastevnan sum á hvørjum ári verður hildin í Forum í Keypmannahavn. Eg havi illgruna um, at Information leggur so hart út mest av øllum fyri at skelka lesaran - fanga hann inn í sín til tíðir illa atkomandi bókaheim, tí seinni skriva teir: „Men det er ikke det hele: For bogen er vel en messe værd? Síðan koma 40 síður bara um bøkur.

Bog Forum er typisk fyri okkara tíð - alt skal marknaðarførast nakað so dyggiliga fyri at hava tilverurætt - eisini bókin. Sanniliga kann nógv negativt sigast um hesa sølustevnu, men eg haldi tó kortini, at hon sum heild er eitt spennandi tiltak, og tað munnu nógv onnur við mær halda, tí har er altíð so pinna pakkað av fólki - ein av negativu síðunum.

Tað sum ger Bog Forum so spennandi, er breiddin av evnum, sum verða tikin upp. Á næstan eini og hvørjari sølustevnu annars, er bara eitt evni, um talan er um eina fiskastevnu, so er tað altso nokko avmarkað, hvussu víða um ið annars verður komið. Á bókastevnuni harafturímóti eru evnini óendalig, alt frá fiski til lívsins innastu eksistentiellu spurningar, tí bøkur kunnu jú snúgva seg um hvat sum helst. Eingin kann siga, at tað er keðiligt á hesi stevnuni, tey vitjandi kunnu fara at lurta eftir rithøvundum sum brenna fyri mongum og hvørjum, møguleikarnir fyri íblástri eru næstan ótroytiligir.

Eg var á bókastevnuni í tveir dagar, tveir spennandi men útlúgvandi dagar - nógvur larmur, trokan, ring luft og fjølmiðlakæti. Eftir eina viku í Keypmannahavn, gekk leiðin aftur til Suðursponsku bygdina Monachil, har vit búgva.

Tað var eitt undarligt upplivilsi at fylgja Freyju oman í bygdaskúlan bara eitt døgn eftir at hava verið partur av tí østa stórbýarlívinum, har tað mesta snýr seg um „image" ella ímynd. Frá tí yvirsmarta og til tíðir rættiliga tilgjørda, stóð eg í skúlagarðinum saman við øllum hinum mammunum (kynsskipanin her er rættiliga siðbundin, so í skúlagarðinum eru sjáldan nakrir pápar), og tað tóktist onkusvegna heilt surrealistiskt. Nógv varð prátað, tí tann 19. desember skulu genturnar sýna fram sýni flamenco kynstur á palli, reytt klæði skuldi keypast at seyma kjólarnar úr, kjakið snúði seg um, hvussu best var at seyma kjólarnar, og um hvussu nógv ið klæði mundi fara at kosta, tí áðrenn hósdagin skuldu vit jú eisini gjalda 10 euro til kopimaskinuna, sum skúlin hevði keypt uttan at hava tryggjað sær fígging til hana frammanundan.

Í skúlagarðinum vóru eingi mótaklæðir, eingir høgir hælir ella tilgjørd og vælsminkað brøgd - eg kendi, hvussu eg ikki heilt megnaði at umstilla meg frá tí ørkymlandi, ofta grunna stórbýarhugburðinum og til hetta jarðbundna, men sera veruliga og viðkomandi huglagið.

Tað er mær ein ótømandi kelda til undran og íblástur, at heimsins mentanir og lívsverðir kunnu vera so fjøltáttaðar, hóast tað at menniskju um allan heim helst allarinnast inni eru so eins.




# OPEN BY NIGHT Í VÁGUM



Mikudagin 10. desember fyllir Vágatunnilin 1 ár.
Í hesum sambandi fara handlarnir á Vágum at hava OPEN BY NIGHT.
Opið verður til klokkan 23.00, so hettar er eitt gott høvi at fara og keypa sær jólagávurnar í góðari tíð

ÓKEYPIS ER AT KOYRA GJØGNUM TUNNILIN HENDAN DAGIN

**VIT SÍGGJAST Í VÁGUM MIKUKVØLDIÐ!**

Sosialurin 341800



**KIWANIS**



**Vit selja jólatrø í N. Finsensgøtu**
*(millum Vertshúsið og Auto)*

**Opið er soleiðis:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. | 8. des. | til | frí. 12. des. | | kl. 15.00-18.00 |
| Leyg. | 13. des. | | | | kl. 10.00-16.00 |
| Sun. | 14. des. | | | | eingin søla |
| Mán. | 15. des. | til | frí. 19. des. | | kl. 15.00-20.00 |
| Leyg. | 20. des. | | | | kl. 10.00-20.00 |
| Sun. | 21. des. | | | | kl. 14.00-20.00 |
| Mán. | 22. des. | til | týs. 23.des. | | kl. 15.00-20.00 |

**Stuðul til Kiwanis, er stuðul til tey veiku í samfelagnum**





**Jólakonsert við Havnarkórinum**

**Sunnukvøldið kl. 21.00 hevur Havnarkórið, undir leiðslu av Ólavi Hátún, framførslu av jólaløgum.**

**Kom og syng við**

VERTSHÚSIÐ
Restorffs

Sosialurin 341800



# TIL SØLU

**Four Ports 45 fót**



45 x 14 føtur
1 ára gamal.
Motorur: 315 HK Cummins
Væl útgjørdur við tólum
Ferð: 19,5 míl

**Kr. 935.000,-**

Annars eru fleiri aðrir bátar eisini til sølu.
Sí **www.bosdalafossur.fo**

**Sp/f Bósdalafossur • tel 333101**
**fartel 253701 og 286414**








**Sosialurin**

-tað loysir seg



## Tabor Toftir

Dekoratiónskvøld.
Lutaseðlar og Rís'alamande.
Vit møtast kl. 18.00 at gera dekoratiónir.
Øll eru hjartaliga vælkomin!!!